# Føroysk fiskivinnugransking »sjósett«

**Nú er hol sett á fiskivinnugranskingina í Føroyum. Fiskimálaráðið hevur stovnsett tríggjar sonevndar granskingarkjarnar, og týsdagin var tíðindafundur um áhugaverdu verkætlanina**

GRANSKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Ásmundur Guðjónsson hevur vegna Fiskimálaráðið lagt lunnar undir fiskivinnugranskingina, sum nú er »sjósett«*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Seinastu árini hevur nógv verið tosað um fiskivinnugransking í Føroyum, og undir valstríðnum var hetta eitt av málunum, ið flestu politisku flokkar vildu gera til eitt av sínum skjaldramerkjum. At vit eru farin at varpa ljós á vinnugransking, er í fyrsta lagi okkara vinnu fyri at takka. Krøvini til okkara framleiðslu økjast alsamt og hugtøk sum sporføri og skynsemi í veiði, gerast meira og meira avgerandi fyri, um altjóða samfelagið skal keypa okkara framleiðslu. Kappingin um at sleppa at selja framleiðsluna, herðist alla tíðina, samstundis sum fleiri og fleiri eru um at skapa útboðið og nøkta eftirspurningin á heimsmarknaðinum.

## Hol sett á

Nú er so hol sett á fiskivinnugranskingina í Føroyum. Fiskimálaráðið hevur stovnsett tríggjar sonevndar granskingarkjarnar: Ein innan lívfrøði/ evnafrøði, ein innan fiskitøkni/ reiðskapstøkni og ein innan virkingartøkni. Hesir granskingarkjarnarnir eru farin í holt við sítt granskingarvirksemi.

Ásmundur Guðjónsson hevur vegna Fiskimálaráðið verið samskipari av verkætlanini.

Hann sigur, at dentur verður lagdur á, at granskingin verður á altjóða støði, soleiðis at úrslit av granskingini verða kunngjørd í altjóða vísindaligum tíðarritum. Somuleiðis verður eitt netverk bygt upp við granskarar í øðrum londum.

– Dentur verður eisini lagdur á, at granskingin verður viðkomandi fyri føroyska fiskivinnu. Tí er vinnan við til at leggja ætlaninar fyri granskingarkjarnarnar.

Samskiparin sigur, at málið er, at granskingarførleikin, sum verður bygdur upp, verður vinnuni at gagni.

Fiskimálaráðið hevur játtað 3,8 milj. krónur til granskingarvirksemi í 2004. Ein onnur játtan, sum partvís eisini verður tengd at verkætlanini, er játtanin til fiskivinnuroyndir, sum er slakar 8 milj. krónur

– Granskingin verður bygd á tað virksemi, sum longu finst, og vinnan verður ein týðandi partur av tilrættaleggingini.

Ásmundur segði, at um eini 3-5 ár verður verkætlanin eftirmett, og tá verður eitt álit skrivað til Fiskimálaráðið.

– Vit mugu ikki goyma, at gransking er ein langtíðaríløga. Hetta er sum at grundleggja ein urtagarð, segði samskiparin.

## Granskingarleiðarar

Í tíðindafundi týsmorgunin varð greitt frá hugskotinum aftanfyri verkætlaninaum.

Teir, ið eru settir at verða kjarnuleiðarar, greiddu frá, hvussu stungið er út í kortið.

At enda greiddi ein vinnugranskari frá, hvat hann tekst við í sínum granskingararbeiði.

Hóraldur Joensen, Dr. Scient, er settur at leiða tann partin, sum eitur biotøkni. Hann hevur skrivstovu á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

– Endamálið við hesum partinum er at fremja evnafrøðiliga og lívtøkniliga gransking í evnum, sum eru viðkomandi og mennandi fyri føroyska fiskivinnu og samfelagið alt. Somuleiðis verður luttikið í føroyskum eins væl og altjóða granskingarverkætlanum.

Bjarti Thomsen, sivilverkfrøðingur, eru settur at leiða tann partin, sum fevnir um veiði- og reiðskapstøkni.

– Her er málið at fremja viðkomandi og álítandi gransking innan veiði- og reiðskapstøkni, sum skal verða við til at gera føroyska fiskivinnu meira framkomna og effektiva. Við hesum verður vinnan eisini meira lønandi og kappingarfør. Vit fara tí at menna verandi og nýggjar veiðihættir í tøttum samstarvi við vinnuna og við luttøku í altjóða samstarvi.

Helgi Nolsøe, sivilverkfrøðingur, er settur at taka sær av framleiðslutøkni.

– Kjarnin fyri framleiðslutøkni arbeiðir við gransking og menning av framleiðslutøkni innan virking av fiski.

Eisini hesin partur snýr seg um at verða við í føroyskum og altjóða granskingarverkætlanum.

At enda á tíðindafundinum greiddi vinnugranskarin, Oluf Færø, Cand Sient, sum starvast hjá JFK, um KT innan vinnuna.

Hann tosaði serliga um sporføri og hvønn týdning, tað hevur, at keyparin kennir upprunan – frá byrjan til enda – á teirri vøru, hann keypir.

Sosialurin fer at venda aftur til verkætlanina.



*Helgi Nolsøe skipar fyri granskingini í framleiðslutøkni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Bjarti Thomsen er granskingarleiðari í veiði- og reiðskapstøkni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Hóraldur Joensen tekur sær av tí partinum, sum eitur biotøkni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Oluf Færø er helst fyrsti vinnugranskari í Føroyum. Hann starvast hjá JFK í Klaksvík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Stórur áhugi fyri fjølmiðlafakfestivalinum

Nógv fólk hava teknað seg til fjølmiðlafakfestivalin komandi leygardag, sum felagið Synergi skipar fyri

Fakfestivalur
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo



*Um 90 til 100 fólk verða við á fjølmiðlafakfestivalinum leygardagin, sum felagið Synergi skipar fyri*

*Mynd: Jens K. Vang*

Rættuliga nógv fólk hava boðað frá luttøku til fjømiðlafakfestivalin, sum felagið Synergi skipar fyri. Annika Andreasen sigur, at við øllum upplegshaldarunum verða eini 90 til 100 fólk savnað í Sjómansskúlanum í Havn leygardagin.

– Vit eru vælnøgdar við undirtøkuna, og vóna vit, at dagurin verður áhugaverdur og spennandi, um enn hann verður nakað langur, sigur Annika.

Nógv tey flestu, sum hava teknað seg eru fjølmiðlafólk fyrst og fremst. Bæði free-lansarar og fólk við tilkýti til ávísan miðil.

Síðani eru tað heilt fitt av politikarum eisini og fólk frá lýsingarstovum og prentsmiðjum.

Annika sigur, at tað sjálvandi er ilt hjá teimum at spáa um, hvussu tiltakið fer at eydnast, men við teimum mongu áhugaverdu fyrilestrarhaldarunum skuldi verið lagt upp til ein spennandi dag.

Byrjað verður við morgunmati og skráseting klokkan 8.30 leygarmorgunin og so byrjar sjálvt tiltakið klokkan 9.00. Dagurin endar um 17.30 tíðina leygarkvøldið, so ongin ivi er um, at hetta er ein langur dagur.

– Um hetta skal broytast til eina aðru ferð ella ikki, tað vita vit aftaná tiltakið, sigur Annika og leggur afturat, at hetta jú er fyrstu ferð, at skipað verður fyri slíkum, og tí kann væntast, at tær fara at fáa eyga á okkurt, sum kundi verðið gjørt øðrvísi til eina aðru ferð.

Fjølmiðlafakfestivalurin er tað fyrsta tiltakið av sínum slagi, sum Synergi skipar fyri. Men í mars mánaði verða tvey onnur skeið, sum felagið eisini skipar fyri. Annað er um eitt stýriamboð og hitt verður um børn og sorg.

Kaktusblóman:

# Bíleggja atgongumerki á netinum

**Til ber nú hjá fólki at bíleggja sær atgongumerki umvegis internetið til sjónleikin Kaktusblóman, sum Klaksvíkar Sjónleikarfelag í hesum døgum framførir**

**Tíðindaskriv**
*post@sosialurin.fo*



*Til ber nú at bíleggja sær atgongumerki til skemtileikin Kaktusblóman umvegis heimasíðuna hjá Klaksvíkar Sjónleikarafelag*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Um fólk hava hug og møguleika til tess, kunnu tey nú bíleggja sær atgongumerki til skemtileikin Kaktusblóman umvegis heimasíðuna hjá Klaksvíkar Sjónleikarafelag. Hetta er ein roynd fyri fyrst frá felagnum at víðka um tænastustøðið, tá tað kemur til at selja atgongumerki.

Vanliga kunnu tey bíleggjast í Atlantis ein tíma undan sýning, men nú kunnu tey sum sagt eisini bíleggja á netinum. Og tað kann gerast allan dagin inntil klokkan 18.

Tá ein ætlar at bíleggja á netinum, er bara at fara inn á heimasíðuna hjá felagnum, sum er www.kls.fo og fylgja upplýsningunum har.

Treytir eru settar fyri, at ein bílegging verður góðtikin av felagnum, og mugu hesar verða fylgdar fyri, at ein skal hava ognað sær eitt atgongumerki.

Hetta hava tey í sjónleikarafelagnum gjørt av at gera fyri at sleppast kann undan trupulleikum.

Kaktusblóman verður framførdur hvørt kvøld klokkan 19.30 til hóskvøldið í hesu vikuni.